## FIFA vil hava Zidane og Materazzi at hittast



Mest umtalaða hending í HM-endaspælinum í fótbólti í summar var, tá ið franski stórspælarin Zinedine Zidane og italski verjuspælarin Marco Materazzi brustu saman í finaluni. Endin var at Zidane fekk reyða kortið, og síðani hevur nógv verið tosað um hendingina. Nú vil FIFA-forsetin hava, at teir báðir spælararnir hittast fyri at leggja hendingina aftur um bak. Sepp Blatter segði á eini ráðstevnu í Berlin, at FIFA arbeiðir við málinum, og eitt stað, sum er upp á tal, er Robben Island í Suðurafrika, har Nelson Mandela sat fangi í 27 ár.

## Italia hevur brúk fyri Totti

Tað hevur als ikki gingið eftir vild hjá italsku heimsmeistarunum í nýggju EM-undankappingini. Italia er í bólki saman við Føroyum, og higartil hevur Italia bert fingið eitt stig fyri tveir dystir. Tað hevur fingið tann kroysta venjaran, Roberto Donadoni, at heita á Francesco Totti um at koma aftur á landsliðið. Totti var ikki við í tveimum báðum undanfarnu dystum.

– Eg rokni við, at Totti fer at spæla á landsliðnum aftur longu í næsta mánaði. Vit skulu tosa saman um formin hjá honum, tá næstu dystirnir nærkast, men er hann klárur, so spælir hann fyri Italia aftur, sigur Donadoni við italskar fjølmiðlar.

# KÍ trumlaði AB niður

**KÍ og AB hava kappast í fremstu røð hjá kvinnum í hesum kappingarárinum, men sunnudagin varð AB so dyggiliga sett upp á pláss í Klaksvík. GÍ hevur nú togað seg fram á næstfremsta plássið og spælir avgerandi dyst um FM í Klaksvík mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sunnudagin spældu tvey av fremstu kvinnuliðunum í ár dyst ímóti hvørjum øðrum. KÍ hevur sum vant ligið á odda í kvinnudeildini, men í steypafinaluni fekk KÍ harða mótstøðu ímóti einum røskum og væl spælandi AB-liði.

Tað var tó einki at gera hjá AB, tá tær vitjaðu hjá seksfaldu føroyameistarunum um vikuskiftið. KÍ heilt einfalt trumlaði liðið av Argjum niður og vann heili 10-1.

Í fyrra hálvleiki skoraði KÍ bara tvær ferðir, men tað var heimaliðið, sum sat á tí allarmesta, og eitt av fáu skotunum hjá AB í fyrra hálvleiki endaði í málinum, so støðan í hálvleikinum var 2-1 til KÍ.

Í seinna hálvleiki punkteraði Kí dystin við málinum til 3-1 tríggjar minuttir eftir steðgin. AB tóktist fall í fátt, og argjakvinnur hóttu bert við onkrum kontraálopum við Elin Katrinu Haraldsen.

KÍ helt hinvegin málveitslu og økti upp í 10-1, áðrenn Petur Reinert bríkslaði sokallaða toppdystin av.

Málini hjá KÍ skutu Rannvá Andreassen 4, Kristina Eyðbjørndóttir 3, Bára S. Klakstein, Malena Josephsen og Randi Wardum hvør sítt.

### GÍ vann aftur

Gøtukvinnur hava staðið seg væl í endaspælinum hjá kvinnum. Fyrst tóku tær fyrstu stigini frá KÍ, síðani vunnu tær á Argjum, og sunnudagin vunnu tær aftur, tá EB/Streymur vitjaði í Gøtu.

Bæði liðini lógu fram við fyrstu løtuna, og tey skoraðu eisini bæði í fyrra hálvleiki. Heidi Heinesen legði GÍ á odda, men Rakul Magnussen javnaði fyri EB/Streym.

So var tað at stóri spælarin hjá GÍ, Hanna Isaksen, sum tók yvir. Fyrst økti hon til 2-1 fyri hálvleiksssteðgin, og í seinna hálvleiki skoraði hon tvey mál afturat, so at GÍ samanlagt vann 4-1.

Mikukvøldið kl. 18.30 spæla KÍ og GÍ í Klaksvík, og hesin dystur verður avgerandi fyri, hvør verður meistari í ár. KÍ liggur framvegis væl á odda, og vinnur KÍ dystin, eru Klaksvíkskvinnur meistarar aftur í ár. GÍ kann varðveita sín FM-møguleika við at vinna ella spæla javnleik.

**1. deild kvinnur – FM-bólkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. KÍ | 2 | 12-3 | 25 |
| 2. GÍ | 3 | 6-3 | 20 |
| 3. AB | 3 | 3-12 | 16 |
| 4. EB/Str. | 3 | 2-5 | 11 |

**Næstu dystir**
13/9 KÍ-GÍ
14/9 EB/Streymur-AB

Skála – NSÍ 2-0 (0-0)

# Flott spæl og sigurin

**Skála var til tíðir flúgvandi og spældi ein undirhaldandi dyst við ferðmiklum og flottum spæli. Vantandi neyvleikin framman fyri málinum var tó um at kosta, men so komu málini og Skála sigraði fult uppiborið á grannunum á eystara arminum á Skálafjørðinum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Heilt fitt av fólkið var savnað til fótbóltsdyst á Skála mánakvøldið, har grannauppgerð var, tá vespurnar úr Runavík vóru og vitjaðu. Tað var turt, ikki ein ond rørdist og karmarnir til ein góðan fótbóltsdyst vóru so at siga optimalir.

Samstundis sum tíðindini byrjaðu bríkslaði Lassin Isaksen dystin í gongd, og beinavegin var greitt, at á Skála skuldi heimaliðið ráða.

Teir appilsinlittu fluttu bóltin skjótt og væl sína millum. Úr einum borði í hitt, so mitt niðan eftir vøllinum og so aftur út í borðini.

### Mállleysur fyrri hálvleikur

Skjóta og góða spæli hevði við sær, at liðið kom fram til fleiri málmøguleikar. Onkrir størri enn aðrir, men hvørja ferð teir nærkaðust brotsteiginum ella komu í skotstøðu, so vantaði neyvleikin, ella eisini varð bóltrurin trillaður runt nakrar ferðir aftrat, og so fekk NSÍ verjan ruddað burtur.

Eitt dømi um vantandi neyvleika var, tá eitt korter var spælt. Vælleikandi Levi Hansen kemur niðan í vinstru síðu og leggur ein bólt inn fyri. Hesin endar so ella so fyri føturnar á Jónhard Fredriksberg, men við tómum málið framman fyri sær fær hann ikki skot á.

Eitt annað dømi var, tá Bjarni Jørgensen, sum eisini var væl upplagdur, fekk eina fríspæling og rann seg leysan av verjuleikaranum. Men einsamallur við Jens Martin Knudsen gjørdist skotið og veikt, og Jens Martin kundi uttan stórvegis trupulleikar bjarga skotroyndini.

Runavíkingar vóru so at siga trýstir í botn, men onkran kontramøguleika fingu teir tó.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki var tað Bogi Løkin, sum endaði eitt kontraálop, men góða skot hansara smeyg sær dygst framvið stongini og út til málspark.

Eisini Christian Høgni Jacobsen royndi seg viðhvørt, men var ongantíð nær við. Tað var Iulian Florescu har aftur ímóti fimm minuttir fyri steðgin.

NSÍ vann sær fríspark nakað uttan fyri brotsteigin og eitt sindur úti í høgru síðu. Iulian Florescu varð settur at skjóta. Hann lyfti bóltin upp um múrin men skotið brast á stongina. Hetta var vandamesta royndin á øllum fyrra hálvleiki, og samstundis eisini tað nærmasta NSÍ kom einum máli.

### Mál beinanvegin

Seinni hálvleikur byrjaði við, at Bjarni Jørgensen varð tikin út og Debus Danielsen varð settur inn fyri hann. Bjarni Jørgensen hevði spælt ein fínan fyrra hálvleik, men hevur verið skaddur stóran part av árinum og orkar helst ikki at spæla ein heilan dyst.

Debus Danielsen skuldi tó ikki brúka langa tíð at sannføra bæði viðhaldsfólk og venjara um, at hann var rætti maðurin at seta inn.

Bara tríggjar minuttir inn í seinna hálvleik fær ein Skálaleikari bóltin mitt fyri brotsteigin. Hesin er pressaður men fær tó lagt bóltin út í høgra borð til Levi Hansen, sum smekkaði hart inn fyri, og við handaru stong kemur júst innkomni Debus Danielsen flúgvandi og taklar hann bóltin í netið.




### Vespur uttan brodd

Eitt korter inn í seinna hálvleik kom NSÍ til sínar størstu kjansir. Fyrst royndi Jústinus Hansen seg, eftir fína frísparkskombinatión við Iulian Florescu og Helga L. Petersen, men Vlada Filipovic stórbjargaði góða flktaranum.

Minuttin eftir var aftur um reppið at NSÍ fekk mál, men Christian Høgni Jacobsen misnýtti upp á tað